Góðan dagin,

Svar til spurningar frá Fíggjarnevndini sent vegna landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Meginreglan í byggiverkætlanum seinastu árini hevur verið, at verklagslógir ikki verða lagdar fram í Løgtinginum, fyrr enn fyrireikandi arbeiðið er liðugt og útboð hevur verið.

Talan er um eina serliga verkætlan í fleiri stigum. Ynski er at læra av tilgongdini, áðrenn seinni verkætlanarstig verða framd og boðin út, tí talan er um stórumvæling og ikki nýbygging.

Játtanarskipanin krevur, at verklagslóg verður gjørd, um kostnaðurin er hægri enn 10 mió.kr. Fíggjarmálaráðið tekur tí undir við, at verklagslóg verður gjørd til fyrsta verkætlanarstigið, áðrenn verkætlanin er boðin út frammanundan.

Vinarliga / Kind regards

Lisa Randi í Dali
Samskipari / Coordinator

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo